# Samd nevnd heitir á Helenu um at stilla upp

**Nevndin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag vil fegin hava Helenu Dam á Neystabø á listan í Suðurstreymi, men Helena hugsar. Fleiri av teimum trúgvu javnaðarfólkunum vilja ikki á listan aftur hesuferð.**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*



*Helena Dam á Neystabø tapti stríðið um pláss á javnaðarlistanum seinastu ferð. Hesaferð hevur hon fingið beinleiðis áheitan frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag um at stilla upp*

Fyri ella í móti Helenu.

Mánakvøldið verður spurningurin aftur aktuellur. Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevur fyrsta uppstillingarfund til løgtingsvalið. Verður Helena við ella ikki?

- Nevndin hevur heitt á Helenu Dam á Neystabø um at stilla upp fyri flokkin, men hon umhugsar støðuna til mánakvøldið, sigur Bjarki Mohr, formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

Upp til seinasta løgtingsval royndi Helena Dam á Neystabø í seinastu løtu at sleppa upp á listan. Hon bjóðaði seg fram á triðja uppstillingarfundi. Felagið í Havn býtti seg í tveir partar, sum hvør í sínum lagi bóðu fólk møta á fund og atkvøða antin fyri ella í móti. Sjálvur formaðurin, Jóannes Eidesgaard, møtti á uppstillingarfundi í Havn fyri at tala hennara søk. Men har vóru ov nógv sár, sum ikki vóru grødd. Helena Dam á Neystabø slapp ikki við.

### Baklandið í lagi

Helena Dam á Neystabø váttar, at hon hevur fingið áheitan frá nevndini um at stilla upp.

- Eg vurderi mína støðu - bæði í mun til ta útbúgving, sum eg eri í holt við og hvat flokkurin kann garantera, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon er sera varin at siga nakað um hennara persónur aftur hesuferð kann býta flokkin í tvey.

- Eg gangi út frá, at tá nevndin heitir á meg, so hevur hon baklandið í flokkinum í lagi, sigur hon.

Tað kann gerast eitt stutt og strævið valstríð hjá Helenu Dam á Neystabø. Henni manglar eitt hálvt ár av eini leiðsluútbúgving og fleiri munnligar próvtøkur liggja í januar uttanfyri Føroyar.

### Styrkt flokkin

Nú er tíðin liðin og Helena Dam á Neystabø hevur verið limur í Javnaðarflokkinum í næstan tvey ár.

- Eg haldi tað vera eitt gott hugskot, at Helena Dam á Neystabø stillar upp, hon hevði styrkt flokkin í Suðurstreymi, tí hevur nevndin beinleiðis heitt á hana um at stilla upp, sigur Bjarki Mohr.

Hann væntar ikki, at fólk hesaferð fara at taka seg saman - antin til at atkvøða fyri ella ímóti Helenu.

- Eg haldi, at nú er friður um hasi viðurskiftini, tí so rúm tíð er gingin.

Helena Dam á Neystabø var limur í Javnaðarflokkinum til 1990, men meldaði seg út stutt fyri løgtingsvalið og endaði á listanum hjá Sjálvstýrisflokkin, har hon var vald, og hon hevur eisini umboðað Sjálvstýrisflokkin í landsstýrinum.

### Liðugt til jóla

Nevndin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag ger uppskot við fyrstu 11 nøvnunum, sum verða løgd fram á fyrsta fundi. Og har skulu nógv nýggj nøvn á. Fleiri av teimum trúgvu javnaðarfólkunum, sum í áravís hava bjóðað seg fram, hava boðað frá, at tey ikki vilja meiri.

- Har verður nógv nýtt blóð, og tað kann eisini vera gott, sigur Bjarki Mohr.

Hann nevnir kend valevni sum Kára Petersen, búskaparfrøðing, Hendrik Thomsen, fyrrverandi formann í Postfelagnum, Jan Midjord, fyrrverandi formann í Havnar Arbeiðsmannafelag, Eyálv Dimon, fyrrverandi floksskrivara og Thomas Arabo, fyrrverandi landsstýrismann, sum allir hava boðað frá, at teir ikki stilla uppaftur. Bartal Poulsen, sum var umboð fyri Sosialistiskt Ungmannafelag, stillar heldur ikki upp, tí hann er staddur í USA.

Felagið ætlar at gera listan lidnan í næstu viku.

# Sambandssflokkurin tekur Rósuna

**Í Vágum hevur borgarstjórin í Sandavági, Rósa Samuelsen, valt at stilla upp fyri Sambandsflokkin**



- Eg havi ongantíð verið í landspolitikki áður, men allar ætlaninar við kommununum, hava gjørt, at eg fegin vil vera við at ávirka gongdina, sigur Rósa Samuelsen.

Hon hevur verið virkin í kommunalpolitikki í Vágum, har hon er borgarstjóri í Sandavágs Kommunu. Hon var vald í bygdaráðið í Sandavági á einum ópolitiskum borgaralista.

Higartil hevur Marjus Dam verið stóri atkvøduslúkarin í Vágum. Um hetta kann broyast kann bara úrslitið vísa.

- Tað eru tey kommunalu viðurskiftini, sum hava mín størsta áhuga. Eg havi fylgt við í arbeiðinum at geva kommununum fleiri uppgávur, men eg haldi tað skal gerast rætt, sigur Rósa Samuelsen.

Á stórpolitiska økinum liggur Rósa Samuelsen beint á sambandsleið.

- Eg haldi gongdin við yvirtøkunum seinastu tíðina er farin skeivan veg.

**øw**

## RoWan spælir á Platform

Leygarkvøldið fer Róin Siggertsson at spæla til dans á Platform í Havn. Saman við honum fara føroyskir tónleikarar at spæla

Róin - ella roWan, sum hann kallar seg á tónleikamáli - er búsitandi niðri, har hann fæst við tónleik. Hann er tó av og á í Føroyum og spælir, og hann var millum annað við á ólavsøkukonsertini í ár. Nú fer hann aftur at spæla í Havn, og tað verður á Platform leygarkvøldið.

Saman við honum spæla føroyskir tónleikarar sum Ólavur Øster og Pauli Magnussen.



# Reyðabók verður ein bumba í valstríðnum



*Bent Jensen, søgufrøðingur, er mest sum liðugur við at skriva frágreiðingina um sína skjalarannsókn eystanfyri. Bókin kemur beint í valstríðið, men tað er ikki hansara borð, heldur hann*

**Hernaðarkanningin í Russlandi av støðu Føroya undir kalda krígnum kann gerast ein bumba mitt í føroyska valstríðnum. Bókin er nærum heilt liðug, sigur Bent Jensen, og hon verður helst almannakunngjørd beint eftir nýggjár. Sámal Tróndur Finsson Johansen, søgufrøðingur, roknar við, at hon verður misnýtt politiskt eins og Svartabók**

KALT KRÍGGJ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Kanningin í skjalagoymslunum eystanfyri av støðu Føroya í kalda krígnum verður almannakunngjørd í somu løtu, hon er handað. Helst verður tað beint hinumegin ársskiftið, sigur Herluf Sigvaldsson, stjóri á Uttanlandsdeildini hjá Løgmansskrivstovuni, sum hevur bílagt kanningina.

Søgufrøðingurin sjálvur, sum hevur verið í Italia og skrivað kanningina, er aftur í Danmark, og hann sigur, at bókin er um at vera heilt klár. Avtalan er, at hann skal gera hana lidna í desember, og síðan handa løgmanni hana. Bent Jensen er klárur yvir, at føroyingar eru farnir inn í eitt valstríð, tí løgmaður hevur útskrivað val til 20. januar, men tað kemur ikki honum við.

– Hetta fær meg ikki at umhugsa, um eg skal halda bókini aftur, til valið er av. Eg arbeiði púra óheftur av politiska valdinum. Eg havi eina avtalu við løgmansskrivstovuna, sum eg fari at halda. Eg havi bundið meg til at vera liðugur áðrenn árskiftið, og tað veri eg, sigur Bent Jensen.

### Kann misnýtast

Bent Jensen er nøgdur við bókina og heldur nógv spennandi vera komið fram, men hann vil einki siga um innihaldið yvirhøvur. Spurdur, um innihaldið í hansara bók kann vera misnýtt í valstríðnum, sigur hann, at tað er ilt at siga.

– Alt kann nýtast og misnýtast í politikki, sigur Bent Jensen.

Tað er eisini royndin hjá Sámal Tróndi Finsson Johansen, sum skrivaði bókina um støðu Føroya í kalda krígnum vestanfyri. Hann er yvirhøvur ikki í iva um, at ein slík bók verður brúkt í einum valstríði.

– Eg vóni ikki, at ein slík bók fer at ávirka valið, men tað fer altíð at vera okkurt, sum kann misnýtast. Eg veit ikki, hvat hann hevur lagt dent á, men eg havi sjálvur upplivað, hvussu Svartabók varð misnýtt til alt millum himmal og jørð, sigur Sámal T. F. Johansen, søgufrøðingur, sum í dag er landsskjalavørður.

### Óheppin løta

Sámal Tróndur heldur tað vera óheppið, at ein søgubók kemur upp í valstríðið. Løgmaður átti at umhugsað, um bókin skal haldast aftur, til valið er av, sigur hann.

Spurningurin er, hvat Bent Jensen hevur valt at tikið fram. Sjálvur vil hann einki siga. Hann fírir ikki fyri at nevna nøvn, tá ið hann sigur sína søgu og er ein kontroversiellur søgufrøðingur, sum hevur gjørt tað til sítt aðalmerki at gera upp við kommunismuna. Í hesum føri verður talan um fólk á vinstraveinginum í Føroyum, sum kunnu koma undir lupp, og tað er funnin fressur í einum skitnum valstríði.

Sámal Tróndur Johansen royndi sjálvur at nevnda sum minst av nøvnum, tá ið hann skrivaði Svørtubók. Roynt var halda seg uttanveltað til tilfarið og kortini varð tað misnýtt. Hann nevnir dømi um sonevnda Føroya-kortið, sum danir brúktu í samráðingum við amerikanar, og tað skuldi eitast, at danir misnýttu føroyingar. Petur Mohr Dam og Kristian Djurhuus fingu skyldina í orðaskiftinum, men Sámal Tróndur sigur, at alt løgtingið spældi við – og harvið allar Føroyar.

– Eg dugi væl at ímynda mær, at okkurt slíkt hendir aftur. Eg ivist ikki í, at Bent Jensen er fakmaður og leggur upp fyri misnýtslu. Men sjálvt um hann garderar seg, so vita vit, at politikarar nýta øll vápn. Serliga í einum skitnum valstríði, sigur Sámal Tróndur Johansen.

### Brigdini hvørva

Trupulleikin hjá søgufrøðinginum er, at keldukritikkurin hvørvur, tá ið fjølmiðlar og politikarar fara at viðgera søguligt tilfar.

– Eg upplivdi sjálvur, hvussu nuansurnar hvurvu, og politikarar og onnur tóku ting burturúr, sum passaði teimum best, og restin varð tagd burtur. Eg trúgvi ikki, at Bent Jensen er bílagdur politiskt, men er okkurt í hansara frágreiðing, sum kann misbrúkast, so verður tað brúkt, sigur Sámal Tróndur Finsson Johansen.

## Norðoyingar sláa manngarð um Anfinn

**Løgmaður fekk dygga undirtøku í sínum valdømi mikukvøldið. Norðoya Fólkafloksfelag fer til val uppá at reinsa Anfinn Kallsberg**

VAL 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Allur ivi varð ruddaður av vegnum, og Anfinn Kallsberg fekk 100 prosent uppbakking.

Soleiðis greiður Heini í Marknagili, sum í mong ár var í nevndini hjá Norðoya Fólkafloksfelag. Fyrsti uppstillingarfundurin hjá Norðoya Fólkafloksfelag var mikukvøldið. Hann byrjaði við, at Anfinn Kallsberg tók orðið og segði, at nú máttu limirnir gera av, um hann skuldi halda fram á listanum. Øll reistust. Eingin ivi varð sáddur um undirtøkuna hjá Anfinn Kallsberg.

Heini í Marknagili sigur, at tey góðu 30 árini hann hevur verið í felagnum, minnist hann ikki, at nakar hevur fingið so stóra undirtøku áður. Eini 60 fólk vóru á fundinum.

– Eg ivist onga løtu í, at Anfinn Kallsberg fer at fáa eitt veldugt val her norðuri. Anfinn verður førdur fram sum nummar eitt, og vit fara til val upp á at halda fast um sjálvstýriskósina, sum hann hevur staðið fyri, sigur Heini í Marknagili.

Fólk gita, at Anfinn Kallsberg fer at fáa einar 700 atkvøður í Norðuroyggjum, og tað er nógv. Umframt Anfinn Kallsberg standa Jógvan við Keldu, Jákup Mikkelsen, Rúna Sivertsen og Petur Hans Joensen á listanum, og tað er ein sterkur listi. Sum er hevur flokkurin tveir tingmenn, og nakað langt er til tann triðja, men heilt óhugsandi er tað ikki.

Serliga viðoyingar sláa manngarð um Anfinn Kallsberg, greiður Heini í Marknagili frá, men yvirhøvur halda nógvir norðoyingar, at hann hevur fingið eina harða viðferð fyri sína fortíð.